Hevur man vita so gali›

Hevur man vita so gali›. Nú hava føroyingar tríggjar møguleikar í at velja. Í hvussu so er, tá talan er um at velja útvarpsrás. Tí Útvarp Føroya er ikki longur einasta útvarpsrásin í landinum. Fyri stuttum fór Rás 2 at senda, og í farnu viku fór Lindin í luftina á fyrsta sinni.

Men er grundarlag veruliga fyri trimum útvarpsstø›um í Føroyum?. Nei, eg veit ikki.

Atlantic Radio skuldi jú eiini fíggjast vi› l‡singapeningi, men ta› søguna kenna vit øll. Og forrestin, so metti heimskenda fyritøkan Mc Donalds, at grundarlag var ikki fyri at lata upp eitt Mc Donalds í Føroyum, tí fólkatali› var ikki nóg stórt.

Útvarp Føroya hevur veri› fastur partur av dagligdegnum nú í fleiri harrans ár, men eg loyvi mær at ivast í, um Rás 2 og Lindin eisini koma at ver›a ta›.

Torført er at taka dagar í millum, hvør av hesum bá›um stø›um kemur at standa seg betur, men vænti at Lindi fer at draga longra strái›, tá saman um kemur. Ta› eru nógv ung trúgvandi í Føroyum, og ikki er altí› at so nógv ver›ur gjørt fyri hesi. Men kanska er Lindin eitt satt ljóspunkt á vegnum.

Av ø›rum tilfari í bla›num í dag kunnu vit nevna teir fastu tættirnar, so sum hitlistar, svara so og fløguummæli.

Í farnu viku vóru vit og vitja›u nakrar 10. flokksnæmingar í Havn og spurdu tey nakrar spurningar.

Millum anna› spurdu vit, um hvat tey halda um ætlanirnar hjá samgonguni, um at skipa Føroyar sum fullveldi. Svørini vóru skakandi. Ikki tí. Meiningarnar vóru nógvar, bæ›i fyri og ímóti fullveldinum, men vit fingu líka sum ein varhuga av, at tey ikki hava gjørt sær nakrar tankar um júst henda spurning. Harragud, ta› er jú teirra/ tykkara og okkara framtí›, sum stendur og fellur vi› fullveldismálinum.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

3arin

Letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagið í Yngd.

Yngd

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Jákup Bogi Joensen

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd
í Sosialinum
Hvønn mikudag

Leggja seg eftir ungd minum

Vit leggja sera stóran dent á at gera nógv og gott tilfar til ungdómin, sigur óla Jákup Rólantsson, sum er programlei›ari á Rás 2

JÁKUP BOGI JOENSEN

Ein av n‡ggjastu útvarpsrásunum í Føroyum eitur Rás 2. Og ta› er ikki so langt sí›ani, at Rás 2 var at hoyra á fyrsta sinni. Í fyrstuni vóru bert royndarsendingar á skránni, men nú hevur Rás 2 gjørt sær eina veruliga skrá.

Og størsti parturin av tilfarinum er beinlei›is ætla›ur ungdóminum.

Men hvussu stóran t‡dning hevur ta› at gera sendingar til ungdómin?

- Ta› hevur ótrúliga stóran t‡dning. Vit leggja okkum eftir at fáa ein so brei›an lurtaraskar›a, so ta› hevur stóran t‡dning, seg›i Óla Jákup Rólantsson, sum er programlei›ari á Rás 2, vi› Yngd.

Men hvat leggur Rás 2 størsta dentin á?

R s 2 leggur eftir ungd minum

- Vit leggja stóran dent á, at ta› eru ung fólk, sum gera allar sendingarnar til ungdómin. Vit hava sett nøkur ung fólk í starv, sum øll á›ur hava roynt at gjørt sendingar til ungdómin. So talan er um sera væl kvalifisera›i fólk, leggur óla Jákup Rólantsson stóran dent á.

Eitt anna›, sum Rás 2 leggur sera sera stóran dent á er málbur›urin.

- Ta› kemst ikki undan, at tá talan er um sendingar til ung, koma or› fyri, sum ikki eru hóskandi í ø›rum sendingum, men ta› mugu vit liva vi›.

Vit gó›taka als ikki, at fólk n‡ta ónærislig og ófantalig or› fyri opnari mikrofon, seg›i óla Jákup Rólantsson frá Rás 2.

Lindin v sir ungd minum st ran huga

N‡ggjast útvarpsrásin, Lindin, leggur stóran dent á at gera sendingar til ungdómin

JÁKUP BOGI JOENSEN

Kappingin har›nar alsamt, tá talan er um at gera útvarp í Føroyum. Útvarp Føroya er ikki longur einasta útvarpsrásin í Føroyum. Fyri stuttum fór Rás 2 at senda, og í farnu viku fór n‡ggjast rásin, Lindin, at senda.

Og Lindin fer veruliga at spenna seg út, tá talan er um at gera sendingar til ungdómin. Heili f‡ra fólk eru í fyrstu atløgu sett til at gera sendingar til undgdómin. Ein teirra er Ragnar Mouritsen.

Men hvussu stóran t‡dning hevur ta› at gera sendingar til ungdómin?

- Ta› hevur ómetaliga stóran t‡dning. Líka sum tú sum bla›ma›ur hevur ein bo›skap tú vilt hava út í greinini, so hava vit eisini ein bo›skap vit vilja út vi›. Nevnliga tann gle›iliga bo›skapinum um Jesus. Lindin er tí eitt frálíkt høvi til tess.

Men hvat fer Lindin at leggja dent á?

- Vit leggja sera stóran dent á, at sendingarnar ver›a út frá einum kristnum sjónarmi›i, og at sendingarnar ver›a fyri øll. Líka miki› hvørjari kirku ella samkomu tú kemur frá.

Lindin hevur enn ikki fingi› sína egnu heimasí›a á internetinum, men Ragnar Mouritsen sigur, at hetta ver›ur í nærmastu framtí›. Fyribils er Lindin at fina á chattinum Jesus-chat.

Yngd fer at ynskja Lindini gó›a eydnu.